## Skifti í landsstýrinum

Grønlendingar hava fingið tveir nýggjar landsstýrismenn. Fyrst bað landsstýrismaðurin í heilsu- og umhvørvismálum, Asii Chemnitz Narup, um at sleppa úr landsstýrinum. Hesum eftirlíkaði landsstýrið og hevur valt Agathu Fontain úr IA til nýggjan landsstýrismann. Í hesum viðfangi gjørdi Hans Enoksen, landsstýrisformaður, av at velja Tommy Marø úr Siumut til landsstýrismann í mentamálum ístaðin fyri Doris Jakobsen.

## Hava flogið í hálvt ár

FaroeJet kundi í gjár hátíðarhalda fyrsta hálva árið sum virkandi flogfelag. Hetta heldur felagið vera eitt gott høvi til at fáa eitt meira aktivt samskifti við viðskiftafólkini, og er eitt lítið lutakast fyriskipað til hetta. Felagið biður nevnliga viðskiftafólk senda sær teldupost við viðmerkingum um nøgdsemi, og hvat møguliga kundi verið øðrvísi. 29. november verður so lutur kastaður millum innkomnu tildupostarnar um tveir ferðaseðlar til Danmarkar. Innsendu teldubrøvini skulu innihalda upplýsingar um navn, bústað og tlf-nummar.

# Útbygging og alternativan vøll

**– Vit mugu fyri alla tíðina halda fast um, at um vit byggja ein størri og betri flogvøll enn tann í dag, so kemur hann at ávirka núverandi flogvøll soleiðis, at hesin ikki fer at kunna brúkast, og tíð er tað ótrúliga týdningarmikið at vit halda fast um ætlanirnar at útbyggja verandi flogvøll. Tað sigur Hans Meinhard á Høgabóli, flogovasti hjá FaroeJet**

FLOGVØLLUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*– Er verandi flogvøllur ikki útbygdur tá ein nýggjur kemur, so verður tann í Vágum óbrúkiligur, og so eru vit í somu støðu sum í dag, har vit bara hava ein flogvøll, sigur Hans Meinhard á Høgabóli*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Hann vísir á, at ein nýggjur, størri og betri flogvøllur helst fer at hava við sær, at flogfeløgini útvega sær onnur størri flogfør enn í dag, sum eru bíligari í rakstri og hava fleiri setur.

– Er verandi flogvøllur ikki útbygdur tá, so verður hann óbrúkiligur, og so eru vit í somu støðu sum í dag, har vit bara hava ein flogvøll, sigur Hans Meinhard á Høgabóli, sum er samdur við Jóhan í Niðristovu um, at tá vit tosa um nýggjan flogvøll, so má vera talan um ein alternativan flogvøll.

### Ikki bodnir við

Jóhan í Niðristovu skilir annars ikki heilt tað, sum kom fram í Útvarpinum týsdagin, tá tíðindi bórust um, at Bjarni Djurholm hevði verið á fundi við umboð fyri flogskipararnar.

– Okkara flogskiparar vóru ikki við á tí fundinum, og tí ber ikki til at siga, at teir (Vinnumálaráðið, blðm.) hava verið á fundi við umboð fyri flogskipararnar, sigur Hans Meinhard á Høgabóli, sum harmast um, at flogskipararnir hjá FaroeJet ikki hava fingið fundarboð í hesum málinum.

Í áður umtalaðu útvarpssending framgekk eisini, at flogvøllurin í Vágum ikki var meiri enn næstbest. Vit spurdu tí Hans Meinhard á Høgabóli, um hann er samdur við hesi fatan.

– Hugsa vit geografiskt og í mun til veður og vind, so finna vit ikki nakað dreymapláss í Føroyum til ein flogvøll, og í so máta kunnu vit siga, at vit í Føroyum ongantíð fáa meiri enn næstbestu loysina, sigur Hans Meinhard á Høgabóli, flogovasti hjá FaroeJet.

## Navigator leggur frá landi aftur

**Eftir at hava ligið við bryggju í fleiri vikur, fer Atlantic Navigator á nýggjan túr seinnapartin í dag.**

FISKISKAPUR
*Orð & mynd:*
*Snorri Brend*

**Ánirnar:** Hesar seinastu dagarnar hevur verið nógv virksemi við havnalagið í Ánunum.

Meðan summir arbeiða við at rigga havnalagið til, eru onnur í ferð við at rigga hetta stóra farið til nýggjan túr.

Navigator hevur ligið við bryggju av tveimum orsøkum - í fyrsta lagi vegna fiskaloysi, men eisini tí at ógreiða var um sáttmálarnar hjá manninginum.

Tað skilst, at fremmand fiskiført hava borið eyga við svartkjaft eystanfyri Føroyar. Haraftrat komu sáttmálaviðurskiftini hjá manningini í rættlag fyrr í mánaðinum, har tey fáa eina munandi lønarhækking, bæði í ár og komandi ár.

Nú er so klárt at fara nýggjan túr. Mynstrað verður umborð seinnapartin í dag.



*Atlantic Navigator riggar til nýggjan túr*

# Tvey ymisk mál

**Jóhan í Niðristovu er flogovasti hjá Atlantic Airways, og millum royndastu føroysku flogskipararnar. Hann heldur, at vit í tosinum um nýggjan flogvøll og útbygging av núverandi, mugu skilja tingini sundur**

FLOGVØLLUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

– Tað er sera týdningarmikið at skilja í millum, at vit í hesum tosinum hava við tvey ymisk mál at gera. Annað snýr seg um útbygging av núverandi flogvølli, og hitt snýr seg um ein flogvøll sum ikki er í dag, men møguliga kemur einaferð longur frammi í tíðini, sigur Jóhan í Niðristovu, flogovasti hjá Atlantsflog.

Jóhan í Niðristovu vísir á, at vit í dag onki annað alternativ hava til flogvøllin í Vágum, og tí er týdningarmikið at halda fast um ætlaðu broytingarnar á flogvøllinum. Tí sum hann vísir á, so er ætlanin við einum nýggjum vølli so langt frammi í tíðini.

Jóhan í Niðristovu sigur eisini, at tað er ógvuliga umráðandi at halda fast um, at talan skal vera um ein alternativan flogvøll.

– Talan má vera um ein alternativan flogvøll, og tí mugu ábøtur eisini gerast á núverandi flogvøll. Verður tað ikki gjørt, so fer hann ikki at kunna



brúkast í framtíðini, og so verður nýggi flogvøllurin ikki eitt alternativ, men bara tann einasti vøllurin, sum vit hava, sigur Jóhan í Niðristovu.

Av ábøtum og broytingum Jóhan í Niðristovu millum annað nevnir, er at fáa eina glíðibreyt, fleiri innflúgvingarljós, útbyggjan av terminalinum í Vágum og ikki minst at leingja um vøllin. Hann vísir á, at flogvøllurin ikki hevur verið fyri munandi broytingum síðani 1988, og at tað tí verður neyðugt at gera ábøtur.

Jóhan í Niðristovu slær tó fast, at einasti flogvøllurin, vit hava í landinum, er góður og tryggur.